Ársfrágreiðing fyri 2010

Nevndin setti sær fyri at arbeiða víðari við málunum, sum vóru ásett fyri árið 2009.

1. **Menning av kompetensunum hjá limunum í ráðnum**
2. **At gera etiska ráðið meira sjónligt millum limirnar í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**

**Ad. 1 Menning av kompetensunum hjá limunum í ráðnum.**
Á regluligu fundunum hava limirnir greinað og viðgjørt etiskar tvístøður, sum limirnir sjálvir hava upplivað ella lisið í fakligum tíðarritum. Hetta hevur verið gjørt fyri at menna kompetensuna hjá limunum at viðgera tvístøður.Vit seta okkum framvegis spurningin, hvussu tað man bera til, at so gott sum eingin etisk tvístøða verður send ráðnum til viðgerðar. Vit taka tað ikki sum eina mynd av, at sjúkrarøktarfrøðingar ikki diskutera hesi evni í dagliga yrkinum, men heldur sum, at tað tykist fremmant at senda spurningar til onnur at viðgera. Vit seta eisini spurningin um tað er soleiðis, at sjúkrarøktarfrøðingar ikki brúka etisku leiðreglurnar í dagliga arbeiðinum? Vit undrast tó somikið, at vit hava ætlan um at gera eina minni kanning fyri at fáa at vita hvørjir faktorar gera seg galdandi um sjúkrarøktarfrøðingar ikki brúka etisku leiðreglurnar.

Fleiri fakfeløg í norðurlondum hava sjúkrarøktarfaklig etisk ráð. Hesi hava nú í 5 ár fyrireikað og hildið ráðstevnur um sjúkrarøktaretikk, skift ímillum tey ymisku londini. Í ár var ráðstevnan hildin í Noregi – Trondheimi - við trimum høvuðsspurningum til viðgerðar. EG- reflekterandi praktikarin - Menniskja sum er ómissandi og – Umsorganartøkni. Virkisrúmið hjá etiska arbeiðinum – møguleikar og hóttanir í sjúkrarøktaretiska arbeiðinum í Norðurlondum. Ráðstevnan var skipað við uppleggi, fyrilestri og við orðaskifti í arbeiðsbólkum og felags samanumtøku.

Eins og undanfarin ár er ein samtykt skrivað við einari felags niðurstøðu frá ráðstevnuni. Ætlanin er, at etisku ráðini skulu kunna limir felagsins um innihaldið og møguliga leggja hana á egnu heimasíðu. Etiska ráðið í Føroyum hevur valt at umseta hana til føroyskt og leggja hana á heimasíðu felagsins sjá. Sjúkrarøktaretiska ráðið.

Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur framhaldandi valt at brúka ein lítlan part av játtanini til at keypa bøkur, sum viðgera etiskar spurningar. Bøkur sum eru keyptar í ár eru:

Birkler, Jacob (2009) Etisk håndværk. Munksgaard Danmark

Bugge, D., Sørensen, P.AA.(red.) (2007) Livtag med den etiske fordring. Løgstrup Biblioteket, Klim.

**Ad. 2 Gera sjúkrarøktaretiska ráðið meira sjónligt millum limirnar**

Evnið eutanasi hevur verið frammi í almennu fjølmiðlunum, Dimmalætting og Kringvarpinum. Evnið var lýst sæð bæði frá avvarðandi og sjúkrarøktarfrøðiligum sjónarhorni. Sjúkrarøktaretiska ráðið tók evnið til viðgerðar á fundi og skrivaði viðmerking, sum var løgd á heimasíðu felagsins sjá. Sjúkrarøktaretiska ráðið.

Limirnir í Sjúkrarøktaretiska ráðnum meta framvegis, eins og árini frammanundan, at ráðið verður ov lítið brúkt, bæði av nevndini í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og av limunum yvirhøvur. Ráðið hevur havt fund við forkvinnuna í felagnum, har hetta málið varð umrøtt. Niðurstøðan er, at felagið sendir relevantar lógir og mál til ummælis. Sostatt hevur etiska ráðið givið felagnum viðmerkingar til lógina um heilsuútbúgvingar sjá. fylgiskjal 1 og væntandi verður hetta ein afturvendandi mannagongd.

**Framtíðarætlan**

Á aðalfundi 2008 verður viðtikið, at etisku leiðreglurnar skulu endurskoðast 3. hvørt ár. Fyrireikingar eru tí gjørdar til at viðgera etisku leiðreglurnar og í tí sambandi hevur ráðið sett seg í samband við fakfólk, sum kunnu geva ráðnum viðspæl og objektivar eygleiðingar í umrøðuni av leiðreglunum. Viðgerðin fer fram februar 2011.

Etiska ráðið var stovnað á aðalfundinum hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar 1992 og er sostatt 20 ár 2012. Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur tikið tað til umrøðu, fyri at vera í góðari tíð til at viðgera, hvat skal gerast fyri at markera hetta. Fleiri uppskot eru frammi og ráðið arbeiðir víðari við hesum evni í 2011.

**Nevndarlimir til Sjúkrarøktaretiska ráðið**

Valskeiðið hjá limunum sær nú soleiðis út. Sigrun Wardum endurvald 2007 til 2011, hevur sitið 8 ár og kann ikki veljast aftur fyrr enn um 8 ár. Súsanna Olsen og Maiken Olsen 2007 til 2011, tær standa báðar fyri endurvali. Hildur við Høgadalsá endurvald 2010 til 2014 Sirið Stenberg 2009 til 2013.

*Fylgiskjal 1*

**Viðmerkingar  til uppskot til Kunngerð um útbúgvingarráð fyri heilsuútbúgvingar.**

."Heitið – heilsuútbúgvingar, verður brúkt bæði, tá ið talan er um útbúgvingarráð og útbúgving sum heild. Tað er villeiðandi at brúka felags heitið "**heilsuútbúgvingar",** tá ið tær ikki umboða allar heilsuútbúgvingarnar í landinum.
Hóast **lógin** um útbúgvingarnar brúkar heitið – heilsuútbúgvingar,  kundi við fyrimuni verið víst beinleiðis til hvønn kunngerðirnar fevna um – nevndar:  Kunngerð um útbúgvingarráð fyri heilsuhjálparar og heilsurøktarar og Kunngerð um útbúgving til heilsuhjálpara og heilsurøktara."

**Viðmekingar til uppskot til kunngerð um heilsuútbúgvingar**

§ 13 stk. 1
Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina
Kann lesast sum at foreldramyndugleikin *einsamallur* fær fráboðanina og fyri at sleppa undan misskiljingum broyta orðing til
Um næmingurin er undir 18 ár, fær **eisini** foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina
Sama er galdandi fyri § 13 stk. 2

§ 24 stk. 2
Næmingurin kann bert taka ástøðiliga útbúgvingarpartin umaftur eina ferð

Um hesar treytir skulu skiljast út frá tí, at útbúgvingartilgongdin hjá hvørjum næmingi sær verður tilrættaløgd og fylgd ógvuliga tætt, so er kanska rætt, at viðkomandi bert sleppur umaftur eina ferð. Skotið verður tó upp, at næmingurin kann taka ástøðiliga útbúgvingarpartin umaftur tvær ferð, hetta fyri at næmingurin kann fáa so góðar møguleikar sum gjørligt.

§ 26
Próvtøl ið fylgja 13 tals stiganum fara okkum vitandi skjótt úr gildi, tí kundi við fyrimuni verið soleiðis orðað, at víst verður til galdandi próvtalsstiga.

§ 28 stk. 3
Treytirnar til próvdøming siga ikki neyvt um næmingurin verður einsæris mettur ella um felags próvtal verður givið bólkinum.

§ 43 stk. 1
Kæruviðgerðartíðin 7 dagar tykist heldur stutt og kundi við fyrimuni verið broytt til 14 dagar.

Vinarliga vegna Sjúkrarøktaretiska ráðið

Hildur við Høgadalsá og Sigrun Wardum